# At tora er at eydnast

**Klokkan 15.45 á Vinnudegnum trínur Heini Zachariassen á pallin at halda ein fyrilestur undir heitinum »At tora at gera feilir«**

VINNUDAGUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Heini Zachariassen nevndarformaður í Føroya Tele og situr í nevndini hjá FC Amager*

Heini Zachariassen er kendur innan vinnu í Føroyum. Í vár gavst hann sum stjóri í felagnum Bullguard, hóast fyritøkan tá hevði havt stóra framgongd. Harafturat er Heini Zachariassen nevndarformaður í Føroya Tele og situr í nevndini hjá FC Amager. Hann er kendur fyri at royna nýggjar leiðir og at byggja fyritøkur upp. Í løtuni arbeiðir hann við eini nýggjari verkætlan, sum hann tó ikki vil úttala seg um beint nú, men hevur arbeitt við í einar tveir mánaðir.

Sambært honum sjálv kundi hent seg, at hann lyftir lokinum undir fyrilestrinum á Vinnudegnum.

### Verður spennandi

Heini Zachariassen er eitt slag av íverksetaratýpu, og var biðin um at halda ein fyrilestur á Vinnudegnum.

- Teir spurdi um eg kundi hava eitt innlegg á degnum, og at eg sleppa at halda hann um tað eg vil. Tað verður sjálvandi spennandi at tosa við so nógv vinnulívsfólk í einum, sigur Heini Zachariassen



**Hann, ið einki vovvar hann einki vinnur**

### At tora er alt

Tá Heini Zachariassen talar á Vinnudegnum, fer fyrilesturin at handla um tað at tora.

- Eg havi lagt til merkis, at intelligensur og annað sær út til at hava minni at siga í eini suksé, enn júst tað at tora. Tað handlar um at bróta barrierur og at fara útum sína comfort-sonu, sigur Heini Zachariassen.

Sambært Heina Zachariassen verður fyrilesturin – fyrst og fremst – um at tora á einum persónligum støði, men at hetta á mangan hátt eisini kann flytast til bæði fyritøku og samfeløg.

Hann leggur afturat, at føroyingar, sum hava pengar um hendi ofta hava vunnið sær hesar innan fiskivinnuna, og at hesir ofta vilja vera verandi innan sína vinnu. Hetta er nakað Heini Zachariassen í fyrilestri sínum vil nema við.

- Ofta tora vinnulívsfólk ikki at seta pengar í virksemi uttanfyri sína vinnu, og klári eg bara at umvenda eitt ella tvey av teimum 300 til 400 vinnulívsfólkunum, so havi eg nátt mínum máli, sigur íverksetarin, sum í hesum føri nærmast kennir seg sum ein trúboðara.

### At vera sterkur í trúnni

- Av og á ger onki, um mann hevur eitt sindur av blindum vinklum, tí er mann sterkur í trúnni uppá tað sum mann ger, og ikki letur onnur draga ein niður, kann tað gott kompensera fyri evnini, sigur Heini Zachariassen.

Hann greiðir eisini frá, at mann ofta sær fólk við rímiliga høgum intelligensi analysera og fokusera uppá trupulleikar, heldur enn at fara í gongd og tora at byrja sítt virksemi, og at tað kann vera eina stórur trupulleiki

Helst greiðir Heini Zachariassen eisini frá nógvum øðrum á Vinnudegnum, men her var so ein brellbiti til fyrilesturin á fríggjadagin.

# Framtaksgrunnurin: Innovativar verkætlanir fyrimun

**Framtaksgrunnurin hevur sum mál at fáa sølubæri í eina verkætlan, men grunnurin sær gjarna innovativar umsóknir. Um ein umsøkjari hevur drúgvar royndir hevur minni týdning, tí tær royndir ein umsøkjari ikki hevur, kunnu møguliga skaffast onkra aðrastaðni.**

INNOVATIÓN OG FÍGGING
*Hilmar Simonsen*
*hilmar@sosialurin.fo*

Tá Framtaksgrunnur Føroya varð stovnaður í 1994, var tað við tí høvuðsendamáli at fáa gongd aftur á fiskivinnuna á landi eftir herviligu kreppuna fyrst í nítiárunum. Síðani er nógv broytt, og nú er grunnurin partaeigari í einum breiðum skara av sera ymiskum fyritøkum. Framtaksgrunnurin er ikki ein banki ella peningastovnur, men ein íleggjari, sum serliga hevur áhuga fyri verkætlanum, sum eru klárar at fremja í verki.

Framtaksgrunnurin kann gera íløgur í verkætlanir sum partapening og/ella ábyrgdarlán, sum grunnurin metir vera áhugaverdar. Sosialurin hevur hitt Niels Dann West, stjóra í Framtaksgrunninum, og sett honum nakrar spurningar um fígging av innovativum verkætlanum.

### Traditionelt, ótraditionelt, ella bæði tvey

*Er innovatión nakað, sum kann ræða tykkum í samband við áheitan um íleggingar?*

Nei, innovatión er ikki nakað, ið ræðir okkum.

*Hvat leggja tit í orðið »innovatión«?*

- Innovatión kann vera so mangt, bæði heilt nýskapandi – til dømis Decision3 (eitt felag sum mennir orkusparandi skipanir til skip og bátar, blaðm.) – men eisini ein menning innan meiri vanlig vinnuøkir.

*Um valið stendur ímillum at gera íløgu í eina traditionella vinnu, til dømis okkurt innan fiskivinnu ella handilskap, ella eina ótraditionella vinnu, til dømis ein softwareframleiðara, hvat velja tit so?*

- Nú veit eg ikki hví vit skuldu valt. Kanska vit ynskja at gera bæði tvey. Men um vit skulu velja, so hevur tann innovativa verkætlanin ein fyrimun. Men tað hevur altíð mest at siga, at verkætlanin kann verða burðardygg og sølubær upp á sikt.

*Hvørji minstukrøv seta tit einum innovativum umsøkjara, áðrenn tit møguliga kunnu fara inn í verkætlanina?*

- Krøvini til umsóknirnar eru tey somu til allar umsøkjarar. Tey síggjast á heimasíðuni www.framtak.fo. Annars ber altíð til at venda sær til Framtak við ítøkiligum spurningum.



### Royndir ikki avgerandi

*Hevur tað týdning fyri tykkum, at ein innovativur lánsumsøkjari er royndur persónur, ella kann tað eins væl vera ein óroyndur?*

- Um verkætlanin sær gott út, so er hesin spurningur ikki so øðiliga avgerandi. Tað sum umsøkjarin kanska manglar av royndum, kunnu vit hjálpa til við í samband við val av nevnd og tílíkum. Tað hevur týdning fyri allar verkætlanir, at 'management' er í lagi, tað vil siga stjórn og nevnd. Hesi skulu í felag bera verkætlanina á mál, og mugu gera tær tillaganir, ið tey meta eru neyðugar, fyri at røkka málinum.

*Kann kravið um eginfígging ikki vera tálmandi fyri innovativar verkætlanir, tá hugsað verður um, at tað er ikki altíð at ein persónur við góðum hugskotum, og møguliga góðum lærdómi, eigur nógvan eginpening?*

- Fyrsta svarið kundi verið ja, men ... er ein innovativ verkætlan komin so langt, at hon er klár at føra út í lívið, so hevur hon eitt virðið í sær sjálvum, ið millum annað kann nýtast sum eginfígging. Annars so siga viðtøkur Framtaks, at vit kunnu ikki lutaka við meira enn helvtini av fíggingini, tað verið seg eginfígging ella lánsfígging. Um tørvur er á størri fígging enn Framtak og stigtakarin kunnu koma við, so kunnu vit hjálpa til við at fáa aðrar íleggjarar við. Hetta hava vit gjørt í onkrum førum.